# bygdarmennirnar




## Vildi ikki verða hildin til rukku

### Símum Samuelsen vildi ikki tapa í Vági og nú heldur hann, at spælið hjá HB fer at líkjast

– Í fyrra hálvleiki var rættiliga spælið vánaligt, men í seinna hálvleiki gekk munandi betri.

Leygardagin var vágbingurin, Símun Samuelsen aftur á vøllinum í Vági eftir nógv ár í útlegd.

Síðani hann fór úr Vági hevur hann spælt í GÍ og í Íslandi, áðrenn hann kom tl HB hetta kappingarárið.

Sostatt er hetta triðju ferð hann stígur aftur á vøllin í Vági, sum mótstøðumaður hjá vágbingum, seinast var fyri seks árum síðani.

Og dystin leygardagin vildi hann avgjørt vinna – og tað var ikki bara fyri at hjálpa sínum egna liðið heilt fram í oddin.

– Tíbetur vunnu vit. Eg skuldi halda vikuskifti í Vági og tað hevði ikki verið stuttligt hjá mær at gingið runt har suðuri sum tapari eitt heilt vikuskifti, sigur hann.

**Luftin fór úr**

Sjálvur heldur hann, at fyrri hálvleikur var vánaligur hjá báðum liðum við fáum mguleikum.

– Men í seinna hálvleiki gekk spælið munandi betri. Í hálvleikinum tosaðu um, at tað fór at liggja betri fyri at spæla bóltin í dýpdina hjá teimum móti vindinum og tað riggaði heilt væl.

– Eftir at vit høvdu lagt okkum framum, hevði FC Suðuroy nakrar fínar møguleikar, uttan at fáa mál, men tá ið vit so skoraðu til 2-0, fór luftin úr teimum.

Símun Samuelsen viðgongur, at spælið hjá HB hevur verið skiftandi í ár, men hann heldur avgjørt, at teir eru á rættari leið.

– Serliga fyrri hálvleikur ímóti B36 og seinna hálvleik ímóti FC-Suðuroy, spældu vit væl og nú eru vit har vit vilja vera og tað ætla vit at halda fast um, sigur hann.

**Brúka orkuna skeivt**

Eins nógv og Símun Samuelsen fegnast sum sigurin, eins illa harmast hann um støðuna hjá sínum bygdarmonnum.

- Teir eru í eini keðiligari støðu. Men skal eg vera púra ærligur, uttan at fornerma nakran, haldi eg, at spælararnir í FC Suðuroy skulu hugsa meiri um at spæla fótbólt, tá ið teir eru á vøllinum. Tað er ikki dómarin sum gevur einum liðið málini, so tað er ikki klókt at brúka so nógvar kreftir upp á hann. Tað er bara at gera sær sjálvum ilt, sigur vágbingurin í HB.

Hann sigur, at í HB høvdu teir fyrr í ár sama trupulleika, men teir settust niður og gjørdu upp við seg seg sjálvar, at nú skuldu teir hugsavna seg um fótbóltin og ikki dómaran og alt annað, sum onki hevði við sjálvt spælið at gera.

– Men standa teir í FC Suðuroy saman og arbeiða teir hart og brúka kreftirnar upp á fótbóltin,, skulu teir nokk klára tað, leggur hann afturat.

*aki@sosialurin.fo*

## Nú skulu vit skjótt hava nøkur stig

### Støðan í FC Suðuroy er blivin eitt sindur kriminell og liðskiparin ásannar, at nú skulu skjótt nøkur stig á kontuna

Vit taptu fyri einum betri liðið Men at tapa 3-0 var nakað nógv.

Palli Augustinussen, liðskipari hjá FC Suðuroy heldur ikki at úrslitið av dystinum ímóti HB, gevur eina rættvísa mynd av dystinum.

– Vit sluppu hampuliga væl burtur úr fyrra hálvleiki. HB hevði bóltin meir, men teir høvdu ikki nakrar møguleikar av týdningi og so við og við komu vit meiri við í dystin.

Men tað var seinni hálvleikur sum koppaði dystinum.

– Vit vóru ikki ordiliga klárur til seinna hálvleik. HB spældi betri og vit spældu verri og so gekk tað, sum tað gekk.

– Men eftir at HB varð komið framum, høvdu vit einar tríggjar fínar møguleikar bæði at javna og enntá at leggja okkum framum, men vit tóku ikki av og so vórðu vit revsaðir.

– Og tá brotssparkið kom, var dysturin í roynd og veru avgjørdur.

**Mugu fáa stig**

Palli Augustinussen ásannar, at støðan hjá FC Suðuroy er álvarslig.

– Nú skulu stig á kontuna skjótt, staðfestir hann.

Hann heldur, at uppskriftin er taka av møguleikunum at skora, tá ið teir koma.

– Vit hava ikki teir tiltiknu marginalarnir við okkum og vit hava ikki fingið mál í trimum dystum, so vend má koma í.

Hinvegin heldur hann ikki at hugburðinum bagir nakað og hann hevur fult álit á, at støðan skal nokk batna.

Bygdarmaður tykkara í HB, Símun Samuelsen, heldur, at tit eiga at hugsa meiri um sjálvt spælið, tá ið tit eru á vøllinum?

– Hasum eri eg ikki heilt samdur í. Tað er ikki fyrrenn vit koma afturum, at dómarin fekk nøkur høgg, men tað er nokk mest í frustratión. Tað var ikki tað, sum avgjørdi dystin ímóti HB.

So er spurningurin, hvussu útlitini eru hjá FC Suðuroy at skava sær nøkur stig saman, tí í øllum førum á pappírinum eru trígir teir næstu dystirnir sera tórførir: NSÍ úti, EB/Streymur heima og B68 úti.

*aki@sosialurin.fo*